

## Dimma og Havstova ljósasløkkjarar

Í grein, hann rópar ”Ilt eyga kann einki gott sjá”, sigur formaðurin í Føroya Reiðarafelag, Viberg Sørensen, at Dimmalætting og stjórin á Havstovuni, Hjalti í Jákupsstovu, eru ”lampusløkkjarar”, sum hann tekur til. Viberg sipar til kanningina av fiskivinnu um allan heim, sum eitt kanadiskt blað hevur skrivað um.. - Kanningin er skipað soleiðis, at tað eru seks karakterir ella spurningar, sum londini skulu upp í. Síðan verður ein miðalkarakterur givin, og har liggja Føroyar á odda, slær Viberg Sørensen fast. Hann heldur, at alla staðni høvdu fólk fegnast um eina kanning, sum gav landinum slíkt ummæli. - Men nei, ikki í Føroyum. Dimmalætting skrivar við stórum stavum, at vit eru dumpaðir. Útvarpið tosar við stjóran á Havstovuni, og hann er súrur og sigur, at bara tað, sum teir fáast við, er gott. Í kanningini fáa Føroyar eina so góða altjóða umtalu, sum Reiðarafelagið heldur vera gull verda hjá teimum, sum skulu selja føroyskan fisk og eisini hjá teimum, sum annars skulu selja Føroyar. - Tí er tað so hugstoytt, at vit hava sovorðnar lampusløkkjarar, sum einki gott og positivt duga at síggja, heldur formaðurin í Reiðarafelagnum.

# Sterkar krabbamyndir savna tjóðina

**Onki kann sum sjónvarpsmyndir siga sterkastu søgur um krabbamein, heldur programleiðarin í KvF, sum vónar at savna tjóðina í stríðnum móti sváru sjúkuni í sendingini »Føroyar móti krabba« í annaðkvøld**

FØROYAR MÓTI KRABBA

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Lívið steðgar upp. Ótti og sorg gerast fastir fylgisveinar, samstundis sum lívið verður dýrabærari enn nakrantíð. Søgurnar um krabbamein eru allastaðni kring okkum. Men ongin, sum ikki er raktur, veit hvussu tað kennist at hanga har á eggini og royna at klóra seg upp aftur.

Tí er fremsta journalistiska avbjóðingin hjá Kringvarpinum í annaðkvøld at siga hesar søgurnar so erliga, sum til ber, staðfestir programleiðarin í KvF, Solby Eliasen, journalistur.

Og júst her, hevur sjónvarpið ein heilt serstakan leiklut og møguleika eftir hennara tykki.

- Sjónvarpsmyndir eru uttan samanbering sterkasti miðil at siga søgurnar hjá teimum krabbaraktu, tí hyggjarin hyggur teirra kenslur og stríð beint í eyguni. Hartil hevur sjónvarpið ein heilt serstakan møguleika at røkka út í hvønn krók í landinum beinleiðis og harvið savna tjóðina í stríðnum móti sjúkuni, sigur Solby Eliasen.

### Eisini sólskinssøgur

Nú fyrireikingarnar til stóra tiltakið eru í hæddini, sita sjónvarps- og útvarpsfólk og leggja seinastu hond á mongu innsløgini, sum verða við í sendingini. Og tey vera rættiliga ymisk, tí sambært programleiðaranum hava tey lagt seg eftir at lýsa sjúkuna so fjøltáttað, sum til ber. Við í sendingini verða innsløg um, hvussu tað kennist at fáa staðfest sjúkuna og fara gjøgnum drúgvu viðgerðina, hvussu trupult tað er at siga øðrum frá, at man hevur fingið krabbamein, lívsgóðsku hóast sjúkuna og hvussu tað kendist, tá mamman ella hjúnarfelagin tapti stríðið.

Tó verða tað ikki fýra daprir tímar, sum koma at fylla sjónvarpsskíggjan í annaðkvøld, lovar Solby Eliasen.

- Nógvar søgur um krabbamein eru avgjørt gleðiligar á sín egna hátt, tí vit skulu minnast til, at mong jú gerast frísk aftur. Evsta endamálið við sendingini er jú eisini, at savna pening inn, so enn fleiri kunnu gerast frísk av sjúkuni ella liva væl við henni, minnir Solby Eliasen á.

### Lært nógv

Tiltakið »Føroyar móti krabba« er tað størsta, programleiðarin er við til, síðani hon kom í starvið í summar. Men eisini í aðrar mátar fær Solby Eliasen sín elddóp í annaðkvøld. Fyri fyrstu ferð hevur roynda útvarps- og blaðkvinnan nevniliga eisini roynt seg sum sjónvarpsjournalist við einum innslagi um stóra missin og sorgina hjá eini lítlari familju.

Og programleiðarin viðgongur sum tað fyrsta, at hon hevur lært sera nógv í hesum sambandi.

- Eg havi lært, at sjálvt um krabbamein merkir tey, sum verða rakt, fyri lívið, so ber tað til at koma víðari. At koma so tætt at teirra søgu, hevur givið mær ófatiliga stóra virðing fyri teirra stríði og mátanum, tey megna at liva víðari. Og ikki minst eri eg mint á, hvussu illa vit onnur megna at handfara tað, tá okkara medmenniskju eru í svárastu neyð, sigur Solby Eliasen bersøgin og leggur afturat

- Vit skulu minnast til, at uttan mun til, hvussu pínufult vit halda tað vera at fyrihalda okkum til ein, sum hevur krabbamein, so er tað ongin, sum pínist verri enn tey, sum eru rakt.



*- Okkara leiklutur í annaðkvøld er rættiliga avgerandi, tí beinleiðis sjónvarp hevur ein heilt serstakan møguleika at savna tjóðina í stríðnum móti krabbameini, sigur Solby Eliasen, programleiðari í Kringvarpi Føroya*

Tí skulu vit eisini tora at spyrja inn til, hvussu tey hava tað.

Tí vónar Solby Eliasen eisini, at sendingin kann vera við til, at fólk betri tora at rúma hesum menniskjum og teirra ótta, sorg, vón og gleði sum fylgja við sjúkuni.

### Stór faklig avbjóðing

Umfram programleiðaran fara eini 30 fólk hjá Kringvarpinum til arbeiðis í annaðkvøld uppi í Norðurlandahúsinum. Frammanundan hava tey, hvør á sín hátt, brúkt vikur og mánaðir fyri at gera sítt til at fortelja søgurnar um krabbamein so erliga og autentiskt, sum gjørligt, sum programleiðarin tekur til. Og hóast tiltakið hevur kravt nógva arbeiðsorku, hava starvsfólkini verið fús at átaka sær uppgávurnar.

- Hetta hevur verið ein ómetaliga spennandi faklig avbjóðing fyri okkum øll, og tað merkist í húsinum. Starvsfólkini eru spent og hugagóð, og hava arbeitt tvørtur um deildirnar uttan hóvasták. Tað er týðiligt, at møguleikin at sleppa at gera okkurt øðrvísi enn tað vanliga hevur verið sera inspirerandi fyri øll, sigur Solby Eliasen.

Umframt søgurnar hjá teimum krabbaraktu verða eisini onnur innsløg á skránni í annaðkvøld. Alt kvøldið verður Norðurlandahúsið karmur um eina røð av framførslum, samtundis sum stóra peningainnsavningin er í gongd.

Sum kunnugt byrjaði innsavningin so smátt fyri nøkrum vikum síðani, tá formenninir í politisku flokkunum fóru út við bússuni. Hvussu tað gekst, fáa vit at síggja í tveimum styttri sendingum longu í kvøld. Hvørjum av teimum, tað eydnaðist at fáa mest pening í bússuna, fáa vit at vita í sendingini »Føroyar móti krabba« leygarkvøldið.